

At Tor Olav Trøim fór gjørdist dýrt fyri John Fredriksen. Mynd: EPA/Jochen Luebke

# Seadrill kostar eigarunum milliardir

**Jógvan Hugo Gardar**

21.09.2014 - 13:09

Oljan.fo

Norski ríkmaðurin John Fredriksen, ið millum annað eigur stóran part av Seadrill-fyritøkuni sum eigur West Hercules, hevur mist milliardir síðani hann í summar valdi at gevast við samstarvinum við Tor Olav Trøim.

Trøim hevur í nógv ár verið mettur sum høgra hondin hjá John Fredriksen. Teir hava saman bygt upp Frontline-fyritøkuna, Marine Harvest umframt ymisk onnur feløg, harímillum Seadrill.

Men í summar valdu teir at fara frá hvør øðrum, og tað sær út til at hava verið ein dýrur skilnaður. Sambært Dagens Næringsliv er seadrill-partabrævið lækkað í virði síðani juli við heilum 16 milliardum krónum.

Fyri Fredriksen merkir hetta at hansara virði er minkað við fimm milliardum norskum krónum, meðan Trøim hevur mist góðar 100 milliónir. Hinvegin so gongur felagið Golar LNG, sum Trøim tók við sær, strálandi